# Menniskju- og diakonifatan Bláa Kross Føroya

Blái Krossur

BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Fororð

Hesin bóklingur verður givin út, við tí fyri eyga, at gera sjónligan ein týdningarmiklan part av tí Blái Krossur byggir sítt virksemi á. Menniskju- og diakonifatan eru grundarsteinar undir Blá Kross arbeiðinum og eiga at verða livandi og nærverandi hjá øllum, sum á ein hvønn hátt vara av arbeiðinum, tað veri seg sum nevndarlimur, starvsfólk ella sjálvboðin. Tey, vit samstarva við, hava eisini gagn av greitt at vita, hvat vit standa fyri.

Sum felagsskapur, ið byggir á kristið grundarlag, eigur okkara menniskju- og diakonifatan at verða sjónlig gjøgnum okkara arbeiði. Bæði tá tað snýr seg um fráhaldsarbeiði og hjálpararbeiði. Kristna trúgvin er ikki einans orð, men eisini gerningar – tænasta fyri medmenniskja. Ígjøgnum arbeiðið hjá Bláa Krossi ynskja vit at geva kristnum ein góðan møguleika at sýna trúgv í verki til gangs fyri onkran, sum líður.

Vónandi verður hesin bóklingur lisin og kann verða mongum til íblásturs.

*Hjalmar Hansen, aðalskrivari*

Útgevari: Blái Krossur Føroya, Heiðavegur 32, 600 Saltangará
Givið út í 2011

Týtt og tillagað við loyvi frá Bláa Krossi í Danmørk.
Týðari: Rúni Bjarkhamar.
Uppseting: Miðladeildin, Heimamissiónin
Permumynd: Oggi Lamhauge
ISBN: 978-99918-3-324-8

# Menniskjufatan Bláa Kross Føroya
# - kristin menniskjufatan

Ein orðað menniskjufatan er í veruleikanum ein roynd at svara stóra spurninginum: Hvat er ein menniskja? Hvussu lýsa vit okkum sjálv og medmenniskju okkara? Menniskjufatan okkara kann tí ikki verða lýst leys av siðalæruni, har hon eisini ofta verður flokkað.

Blái Krossur Føroya (BKF) er diakonalur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, sum byggir á grundstøði føroysku fólkakirkjunnar. Tí er læra okkara tann luthersk evangeliska[1]. Menniskjufatan Bláa Kross Føroya er so statt kristin menniskjufatan, ið byggir á áðurnevndu læru[2].

**Skapað í Guðs mynd**
Í kristnu menniskjufatanini allýsa vit menniskjuna út frá Guði, sum sambært Bíbliuni hevur skapað menniskjuna í síni mynd[3]. Hetta merkir tað, at vit ikki eru sjálvstýrandi skapningar. Vit hava Guð sum yvirvald. Vit eru smá samanborin við Guð[4].

Samstundis eru vit sambært Bíbliuni einastu skapningar, sum eru skapaðir í Guðs mynd. Hetta merkir, at okkum er litið til eitt yvirment vald yvir dýrum, plantum o.ø.
Menniskjan er við øðrum orðum sett inn millum Guðs og aðrar skapningar. Hetta er ein skilmarkan, bera vit saman við t.d. menniskjufatan, ið hevur íblástur frá hinduismuni, ið hevur menniskjuna sum Guð[5]. Hetta er eisini ein skilmarkan, bera vit saman við natúralistiska menniskjufatan, ið vil vera við, at menniskjan bara er dýr á høgum menningarstigi.
At menniskjan er skapað í Guðs mynd merkir, at vit eru skapað við einum ómetaligum virði, sum frammanundan er lagt fast – leys av gerðum og verkum ella vantandi gerðum og verkum – leys av likamligum og sálarligum sjúkum – leys av brekum, moralskum mistøkum og fávitsku[6].
So statt er eisini greitt, at menniskjan, samanborin við allar aðrar skapningar, er tilvitað og før fyri at trúgva, lýða og elska[7].
At vit eru skapað í Guðs mynd staðfestir, at lívið er heilagt og friðhalgað. Lívið er gáva frá Guði, virði tess kann ikki verða stigbent, og vit hava ongan rætt at gera okkum til harrar yvir tí. Kristna boðið um næstakærleika boðar okkum at varða av øllum, ið tørvar hjálp – serliga teimum, sum onkursvegna eru komin illa fyri í samfelagnum.[8] Vit skulu virða sjálvræðisrættin og mørkini hjá einstaklinginum, og hava at allari maktgirnd og øllum ágangi, t.e., at vit skulu fáa tað besta fram í okkara medmenniskjum. Vit skulu duga at síggja menningarmøguleikar teirra[9].

**1. Mós 1,26-28**

*v26 Og Guð segði: »Vær viljum gera menniskjur eftir okkara mynd, okkum líkar, og tær skulu ráða yvir havsins fiskum og yvir himmalsins fuglum og yvir fenaðinum og yvir øllum villdjórunum á jørðini og yvir øllum skriðkyktunum, sum skríða á jørðini!« v27 Og Guð skapaði mannin eftir síni mynd, í Guðs mynd skapaði hann hann, sum kall og konu skapaði hann tey, v28 og Guð vælsignaði tey, og Guð segði við tey: »Verðið barnrík og fjølgist og uppfyllið jørðina og leggið hana undir tykkum, og ráðið yvir havsins fiskum og yvir himmalsins fuglum og yvir fenaðinum og yvir øllum villdjórunum, sum rørast á jørðini!«*

## At hava samband við onnur

Eyðvitað eru vit skapað at hava samband við onnur. Lív og virki okkara er knýtt at øðrum (til Guðs[10], til medmenniskjuna[11] og til skapningin sum heild[12].) Skulu vit allýsa diakonstarv Bláa Kross, kunnu vit siga, at tað fram um alt snýr seg um samband menniskjunnar við Guð, við seg sjálva, til næsta okkara og skapanarverkið[13]. Vit eru ikki skapað at liva burtur frá Guði og medmenniskjum okkara, nei, vit eru tvørturímóti knýtt saman sum verur. Bara tá vit hava algóða samveru við onnur, kunnu vit menna algott sjálvsvirði og tryggan samleika.

## Menniskjan er heilskapað

Menniskjan er ein savnað heild. Hon er bæði andi og evni[14]. Hon hevur bæði likamligan, sosialan, sálarligan og andligan tørv[15]. Avgerandi í kristnu menniskjufatanini er, at andin og likamið liggja ikki í stríð hvørt við annað. Endamálið er hvørki at skáka sær undan likamliga, ítøkiliga lívinum í heiminum ella frá andliga lívinum. Bara við góðari samanrenning millum anda og likam, kann menniskjan kenna seg heilskapaða og í javnvág[16].

## Menningartørvur

Ein av grundleggjandi tørvum menniskjunnar er sambært kristnu menniskjufatanini, at alt ikki er høpisleyst, og at tú sjálv/ur ert partur av størri heild[17]. Nú á døgum er rákið, at gamlir trúarsannleikar verða trokaðir burtur, og trúgvin á vísindini og kenslur hava tikið við. Upploysn kemur til sjóndar. Avleiðingarnar eru ótryggleiki og ikki so sjáldan samleikatrupulleikar. Fert tú at ivast í Guði, fert tú skjótt at ivast í menniskjuni[18]. Men júst í hesi sundurpetting sýnir kristna menniskjufatanin, at meining og skilvísi eru í heiminum og í lívinum hjá tí einstaka.

## Undir ábyrgd

At menniskjan er skapað av Guði og er øðrum skapningum yvirment, merkir,

at hon sum ábyrgdarfullur umsitari dugir at taka rættar siðalagsligar avgerðir. Okkum er almikil ábyrgd litin til, og tí kunnu vit eisini verða kravd eftir at skula standa til svars fyri gerðir okkara[19].

**Menniskjan er syndari**

Hóast menniskjan kann avrika nógv gott, er hon eisini merkt av sjálvgleði og óndskapi, og hetta er sambært kristna menniskjusýninum ikki bara tað, ið stavar frá ytri umstøðum og ávirkanum, t.d. arvi og umstøðum, karma ella lagnu. Nei, sjálvgleðin og óndskapurin eru partar av náttúru menniskjunnar. Hon er úrslit av tí lagnutunga vali, sum menniskjan gjørdi í frásøgnini í Bíbliuni um syndafallið[20]. Úrslitið av hesum syndafalli er skilnaður, pína og deyði[21].

Syndin sæst ikki bara í tí, at menniskjan ikki longur er fullkomin, ger mistøk og annað ilt, men eisini í tí, at menniskjan ikki tekur ábyrgd av mistøkum sínum, men heldur roynir at kveistra ábyrgdina frá sær yvir á medmenniskjuna og eisini á Guð sjálvan[22].

Óhentur og skaðiligur atburður kann eisini sambært kristnu menniskjufatanini ikki bara verða greinað við vantandi vitan og innliti (New Age) ella sum avleiðing av vánaligum sosialum og fíggjarligum umstøðum (humansima)[23].

**Treytir líðinganna**

Líðingin er sambært kristindóminum ein av lívstreytum okkara[24]. Hava vit ikki vilja ella evni at savna í eind líðingina og at bera pínuna[25] er vandi fyri, at vit kunnu gerast kenslukøld og missa evnini til innlivan og samkenslu[26]. Hetta er umráðandi í diakonala hjálpararbeiðinum hjá Bláa Krossi. Í fyrsta lagi er týdningarmikið, at tey, ið starvast við diakoni, hava viðurkent sínar egnu líðingar og veikleikar, og at tey av tí sama eru før fyri at sýna innlivan og samkenslu.

Í øðrum lagi eigur kristna áskoðanin á líðingarfyribrigdi at hava avgerandi týdning fyri áskoðanina á tað at vera bundin at rúsdrekka og allar teir likamligu, sálarligu, sosialu og andligu trupulleikar, sum standast av tí hjá tí einstaka.

Vit kunnu ikki lítilsgera tað at vera bundin at rúsdrekka ella øðrum rúsandi til bara at vera eina sjúku[27]. Í viðgerð okkara slepst ikki undan, at vit hava tað ástøði, at rúsevni ikki bara eru njótingarevni, men at tey eisini verða nýtt at linna pínu og líðing við. Viðgerð, sum er í samsvari við hugsjónir og menniskjusýni okkara, má hava til endamáls at hjálpa og stuðla tí neyðstadda, so hann ella hon kunnu gerast før fyri at liva ein vanligan gerandisdag uttan at skula doyva pínuna ella flýggja undan henni við at nýta skaðilig rúsevni.

**Satt frælsi**

Rúsevni rúnabinda okkum, tí tey í fyrstu atløgu stimbra kenslu okkara at vera til. Týðandi partur av hesi ávirkan er júst tann, at rúsevni linna pínuna, men

avleiðingin er, sum frálíður at ávirkanin virkar øvugt, so pínan gerst mangar ferðir verri, og kenslan at vera til og liva sannført gerst til kenslu av, at tú missir jarðsamband og sambandið við lívið. Mong gáa ikki eftir hesum, fyrr enn ov seint er. Ella tey fara at liva við vandanum, tí pínan er so mein, og tí at tey ikki vita sær annan hátt at liva við henni.
Skulu vit sálarliga liva við og sum heild tola kensluliga pínu, so er avgerandi fortreytin hon, at okkum verður veitt hjálp, so vit sanna pínuna og stríða okkum ígjøgnum hana. Á sama hátt er fortreytin hon, at vit fáa smoygt av okkum kenslur av skuld og skomm, og at vit fáa hjálp at ásanna og viðurkenna tann býttleika og tey mistøk, vit hava gjørt[28]. Júst í hesum er møguleiki at fáa sátt og fyrigeving úr kristna evangeliinum[29]. Her er leiðin til veruliga og umfatandi broyting.

Viðmerkingar og bókmentalisti á síðu 14

# Diakonifatan Bláa Kross Føroya

Eftir viðtøkum hjá Bláa Krossi Føroya (BKF) er endamál okkara:

- At hjálpa menniskjum, sum eru illa stødd av rúsdrekka og rúsevna ávum
- At fyribyrgja, at rúsdrekka og onnur rúsevni verða misbrúkt
- At vera rúsfríur felagsskapur
- At slóða fyri rúsfríari lívsførslu
- At boða kærleika Guðs til menniskjur

BKF byggir á og verður rikið sambært kristnu menniskjufatanini, sum hon er orðað í hesum bóklingi.

Gjøgnum orðingarnar í diakonifatan BKF verður greitt frá, hvussu kristna menniskjufatanin sæst aftur í diakoni – t.e. kristnari tænastu.

**Jóh 13,12 -17**
*Tá ið hann nú hevði tváað føtur teirra og latið seg í aftur klæðini og var setstur aftur, segði hann við teir: »Skilja tit, hvat eg havi gjørt við tykkum? v13 Tit kalla meg »Meistara« og »Harra«, og tit siga rætt; tí at eg eri tað. v14 Tá ið nú eg, harrin og meistarin, havi tváað føtur tykkara, tá eiga eisini tit at tváa hvør annan um føturnar. v15 Tí at eg havi givið tykkum eitt fyridømi, til tess at líkasum eg gjørdi við tykkum, soleiðis skulu eisini tit gera. v16 Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Ikki er ein húskallur størri enn húsbóndi hansara; ikki heldur er eitt sendiboð størri enn tann, ið sendi tað. v17 Skilja tit hetta, eru tit sælir, um tit gera tað.*

### 1. Diakoni í bíbilskum ljósi
Tá kristna kirkjan talar um diakoni, verður sipað til ta tænastu, kirkjan og kirkjufólkið veita sínum medmenniskjum. Hugtakið diakoni er úr grikskum (diakonia) og merkir ,,tænasta”. Orðið hevur serliga støðu í Nýggja Testamenti. Øll tala um kristna tænastu hevur uppruna í Kristusi sjálvum.

**Luk 22, 27**
*Tí at hvør er størri, tann, ið situr til borðs, ella tann, ið tænir? Man ikki tann, ið situr til borðs? Men eg eri millum tykkara sum tann, ið tænir.*

**Fil 2,7**
*.. men avklæddi seg hana, í tí at hann tók á seg tænara mynd og gjørdist monnum líkur.*

Diakoni er tí fram um alt at taka ímóti tænastu Krists. Bara tann, ið sjálvur – óuppiborið – hevur havt tørv á hjálp frá øðrum, kann í roynd og veru veita øðrum slíka óuppiborna hjálp. Diakoni er at lata frá sær tað, tú sjálv/ur hevur fingið. Kærleiki Krists er grundarlag, fyrimynd og drívmegi undir allari diakoni.

**Jóh 13, 34**
*Nýtt boð gevi eg tykkum: Tit skulu elska hvør annan; líkasum eg havi elskað tykkum, soleiðis skulu eisini tit elska hvør annan.*

**1 Jóh. 4,19**
*Vit elska, tí at hann elskaði okkum fyrst.*

**Matt 10, 8**
*Grøðið sjúk, vekið upp deyð, reinsið spitølsk, rekið út illar andar. Fyri einki hava tit fingið tað, fyri einki skulu tit geva tað.*

Diakoni, kristin tænasta, er aftursvarið til Krists kærleika. Diakoni miðar kortini ikki beinleiðis ímóti Kristusi, men ímóti medmenniskjuni. Kristus kom við lívi og deyða sínum til jarðar at tæna menniskjum, ikki at verða tænaður. Tí skulu vit svara tænastu hansara við at leggja doyðin á at tæna medmenniskjum okkara.

**Matt 25, 40**
*Og kongurin skal svara og siga við tey: »Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær.*

Krists tænasta, eins og svar hins kristna gjøgnum diakoniina, leggur dent á óendaliga virði menniskjunnar. Í báðum førum tala vit um treytaleysa hjálp til neyðstødd menniskju. Spurt verður ongantíð um sosiala støðu, likamligar førleikar, moralska støðutakan, politiska sannføring, kyn, húðarlit o.s.fr. Hjálpin miðar beinleiðis ímóti tí neyðstadda menniskjanum – ongar millumrokningar eru – og hjálpin fatar um alt menniskja: likam, sál og anda.

Í fyrsta kristna kirkjuliðnum, sum greitt verður frá í Nýggja Testamenti, sæst diakoniin aftur í mongum ymiskum tænastum. Kortini er bindandi felagsskapur í kristna kirkjuliðinum mest umráðandi.

**Áps 2, 44**
*Men øll tey, sum trúðu, hildu saman og høvdu alt í felagi;*

Kristna kirkjan er diakonalur felagsskapur. Hon verður hildin uppi av menniskjum, sum hava til endamáls at tæna, og har hvør í sínum lagi fær gagn av tænastuni hjá hinum. So statt kunnu vit siga, at kirkjuliðið er eitt ,, diakonialt trygdarnet”.

Í kristnu kirkjuni spretta fram mong diakonial tiltøk: grøðing (Áps 5,15) at bera út mat (Áps 6, 1-6) at hjálpa fátækum trúarfeløgum (Áps 11, 27-30) gestablídni (Heb 13,2) o.s.fr. Henda diakoni er ikki bara ætlað teimum í kirkjuliðinum, men fatar um øll menniskju (Gal 6,10).

## 2. Diakoni viðvíkjandi menniskjaligum sambondum

Í BKF royna vit at hjálpa allari menniskjuni – í øllum viðurskiftum hennara. Menniskjur, sum leita sær hjálp hjá BKF, skulu tískil ikki bara fáa hjálp á teimum økjum, sum hava beinleiðis samband við misnýtslu, men teimum eigur eisini at standa í boði at fáa ta hjálp, ið ger, at tær fóta sær í samfelagnum – t.d.:

- Í sosialum viðurskiftum (við medmenniskjað)
- Í likamligum viðurskiftum (við náttúruna og umheimin)
- Í sálarligum viðurskiftum (við sjálvan seg)
- Í andligum viðurskiftum (við Guð)

### Sosial viðurskifti

Menniskjan er skapað at hava felagsskap við onnur. Tí er tað álvarsligur smeitur, tá menniskjur missa sosiala net sítt, t.d. tey næstu, vinir og starvsfelagar. Ofta er misnýtsla uppií – antin tí netið hvørvur, ella tí tað ongantíð hevur verið har.
Í BKF hava vit sum mál at slóða fyri rúsdrekkafríum menniskjaligum felagsskapi. Felagsskapurin sæst aftur í mongum brigdum í fjølbroytta virkseminum hjá BKF. Men um vit so tala um fólk í stuttari viðgerð ella tey, ið starvast á kaffistovuni hjá BKF, so vilja vit, at teimum menniskjum, ið leita upp BKF, verður veittur ábyrgdarfullur og hjartagóður menniskjaligur felagsskapur. Hann skal standa øllum í boði. Annað stavnhald okkara er, at tey sosialu viðurskiftini, sum eru farin fyri bakka av misnýtslu, verða endurreist.

### Likamlig viðurskifti

Menniskjan er skapað sum ein eind av likami, sál og anda. At menniskjan hevur likam merkir, at hon hevur nakrar likamligar tørvir, bæði í sambandi við seg sjálva, náttúruna og medmenniskjuna. Har hesir likamligu tørvir vanta, gongur menniskjan til grundar.
Í BKF vilja vit gera okkara, so hesum likamligum tørvum verður gingið á møti. Í sambandi við sjálvan seg: góðan kost, gott reinføri, ítrótt. Í sambandi við

náttúruna: útferðir og uttanduralív annars. Í sambandi við med-menniskjur: nærleiki, samvera. Felags ítriv er eisini umráðandi táttur.




**Sálarlig viðurskifti**
Menniskjan er skapað við hugsanum og kenslum. Menniskjaliga sálarlívið svarar aftur teimum innskotum, sum koma úr umhvørvinum. Tey kunnu bæði byggja upp og bróta niður eina menniskju.
Í BKF royna vit at byggja upp gleðina, sjálvsálitið og sjálvsvirðingina hjá tí einstaka. Bæði hjá teimum, sum eru viðskiftafólk, og teimum, sum starvast hjá okkum, antin sum lønt starvsfólk ella sjálvboðin. Tey skulu síggja seg sjálv sum virðismikil. Tí skulu øll fáa somu virðing, so tey sanna, at lurtað verður eftir teimum, at tey verða góðtikin, sama hvussu samfelagsstøða teirra enn er.

**Andligu viðurskiftini**
Menniskjan er skapað av Guði at liva í felagsskapi við skapara sín. Eisini hesi viðurskifti eru avgerandi fyri, at lívið kann kennast sambæriligt og hava meining. Hesi viðurskifti verða hildin uppi við tí, at menniskjur fáa kærleika og fyrigeving Guðs í Jesusi Kristi.
Í BKF liggur okkum á sinni at boða kærleika Guðs til menniskjur. Hetta verður gjørt á tann hátt, at hjartagóðska og umsorgan eyðkenna viðurskiftini millum starvsfólkini hjá BKF og tey, sum eru viðskiftafólk. Harumframt skal vera møguligt bæði at lýða á og tala um Krists boðskap, so sama frígering fæst, ið veitt verður gjøgnum trúnna á Jesus Kristus og fylling heilaga andans.

**3. Aðrir tættir í diakoniini hjá BKF**
Umframt at vit í BKF veita ítøkiliga hjálp gjøgnum átøk og stovnar okkara,

liggur okkum á sinni at tala søk teirra fjónaðu í samfelagnum – teirra, sum ikki megna at tala egnu søk sína. BKF er við í samfelagskjakinum og ger vart við vandamálini, sum vit varnast í arbeiði okkara.

**BKF – virkin á fyribyrgingarøkinum**

„Betri er at fyribyrgja enn at grøða”. Hetta er ikki minst galdandi á rúsøkinum. Tí vil BKF vera íðin viðleikari í fjøltáttaða fyribyrgingararbeiðinum millum børn, ung og vaksin.

Eisini stríðist BKF fyri, at rúsdrekkafrí støð verða skipað í samfelagnum, og at so mong sum gjørligt gera av at liva rúsdrekka- og rúsevnafrítt. Hetta seinasta halda vit vera eitt tað fremsta umboðið í øllum fyribyrgjandi arbeiði.

**BKF – hjálp verður veitt allari familjuni**

Tey, ið varða av einum, sum hevur rústrupulleikar, verða mangan gloymd. Men teimum tørvar ikki minst at verða hjálpt. Avvarðandi kunnu vera hjúnafelagi/maki/børn o.o. Endamál okkara í BKF er at hjálpa allari familjuni, ið knógvar undir misnýtsluni, og - har tað ber til - at endurreisa góð familjuviðurskifti.

**BKF – partur av kirkjuni**

Umráðandi er, at kirkjur, kirkjuligir felagsskapir og samkomur annars taka undir við arbeiðinum og uppgávunum hjá Bláa Krossi. BKF tørvar virkið upplendi í føroyskum samkomulívi, har íðuliga verður hildið fast við stavnhaldið hjá BKF. Felagsskapur okkara leggur sær nær at duga betur at virka í kirkju- og samkomulívinum úti um landið, eins og vit royna at fáa sosiala/diakonala arbeiðið sett á dagsskrá í kirkjuni.

**BKF – eitt gott arbeiðsumhvørvi**

Diakoni er ikki bara at hjálpa teimum, sum nýta tey tilboð, vit kunnu geva, men tað er eisini at stremba eftir, at tey, sum starvast hjá BKF – lønt ella sjálvboðin – kenna seg virðismett. Tí er umráðandi hjá okkum, at BKF ber eyðkenni av at vera eitt gott arbeiðspláss á høgum fakligum stigi – eitt trygt arbeiðspláss, har starvsfólkið letur úr hondum dygdargott avrik.

# Diakonifatan Bláa Kross Føroya

## Alt virksemi hjá BKF byggir á kristna menniskjufatan

Gjøgnum diakonifatan verður lýst, hvussu kristin menniskjufatan kann sýnast í verki. Orðið diakoni lýsir ta tænastu kristin veita medmenniskjum sínum.

**Diakoni í viðurskiftum millum manna**
Alt virksemi hjá BKF vendir sær til allar tættir í menniskjuni – antin tað so er sosiali, likamligi, sálarligi ella andligi tátturin.

- Tí liggur okkum á sinni at slóða fyri rúsfríum felagsskapi millum menniskjur – felagsskapi, sum stendur øllum í boði
- Tí liggur okkum á sinni at virka fyri góðari persónligari heilsu, góðum náttúrumedviti og sátt og semju millum manna
- Tí liggur okkum á sinni at skapa umstøður, har gleðin, sjálvsálitið og sjálvsvirðing hins einstaka verða ment.
- Tí boða vit menniskjum Guðs kærleika – bæði við góðsku og umsorgan og við tað, at Guðs orð verður prædikað.

**Aðrir tættir í diakoniini hjá BKF**
Umframt at vera virkin á teimum fýra áðurnevndu økjunum, skulu vit eisini vera sjónlig í sambandi við:

- At tala søk teirra, ið onkursvegna eru komin illa fyri í samfelagnum
- At fyribyrgja rúsmisnýtslu
- At hjálpa familjum
- At vera natúrligur partur av føroyskum kirkjulívi
- At vera gott arbeiðspláss, har starvsfólk – bæði lønt og sjálvboðin - trívast

# Brot úr viðtøkum fyri Bláa Kross Føroya

**§ 01 Navn, grundarlag og loysunarorð**

Stk. 1. Navnið á felagsskapinum er *Blái Krossur Føroya*.

Stk. 2 Blái Krossur byggir arbeiði sítt á tær bíbilsku skriftirnar, sum Guds íblásta, heilaga orð og avgerandi myndugleiki fyri trúgv og lív hins kristna, og á fólkakirkjunnar evangelisku- luthersku játtanina.

Stk. 3 Loysunarorðið hjá Bláa Krossi er *"Við Guds og hansara orðs hjálp".*

Stk. 4 Felagsmerkið hjá Bláa Krossi er ein bláur krossur á hvítum botni.

**§ 02 Endamál**

Blái Krossur er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, sum eftir loysunarorðinum hevur til endamáls:

- at *hjálpa* menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum,
- at *fyribyrgja,* at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni,
- at *virka fyri* eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi,
- at *boða* gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskjur.

**§ 03 Hugsjónin hjá Bláa Krossi**

Hugsjónin hjá Bláa Krossi fatar um:

- at veruligt frælsi fæst við trúnni á Jesus Kristus,
- at kjarnin í kristnum næstrakærleika er felagsskapur millum menniskjur við virðing og samábyrgd hvørt fyri aðrari,
- at fráhald er gott, tá ið talan er um at vísa virðing og samábyrgd fyri næsta okkara,
- at neyðugt er at hava rúsfrí umhvørvi í samfelagnum.

**§ 04 Limaskapur**

Stk. 1 Tann, ið hevur kallið til fráhald, ella av øðrum grundum vil vera limur í tí rúsfría felagsskapinum hjá Bláa Krossi, gevur hetta lyfti: "Eg vátti, at eg skal ikki drekka rúsdrekka ella nýta onnur rúsevni."

Stk. 2 Arbeiðir limur ímóti grundarlagi, endamáli og áhugamálum felagsins, kann landsnevndin strika hann sum lim í felagnum.

Stk. 3 Aðalfundurin ásetur limagjaldið hjá limunum.

**Ják 2,1-4**

*v1 Brøður mínir, havið ikki trúnna á váran Harra Jesus Krist, dýrdardrottin, saman við tí, at tit gera mannamun! v2 Tí at um so er, at ein maður kemur inn í samkomuhús tykkara við gullringi á fingrinum og í skínandi klæðum, og har kemur eisini ein fátækur maður, sum er illa klæddur, v3 og tit hyggja at honum, sum er í teimum skínandi klæðunum og tit siga: »Set tú teg her á henda góða sessin!« men siga við hin fátæka: »Statt tú har, ella set teg niður við fótskammul mín;« v4 gera tit tá ikki mismun hjá tykkum sjálvum og eru vorðnir dómarar við ringum tonkum?*

# Viðmerkingar til menniskjufatan Bláa Kross Føroya

[1] Bíblian og luthersku játtanarritini. (Luthers katekismus, trúarjáttanir luthersku kirkjunnar og Confessio Augustana)

[2] Sambært John Steiner eru ymsar kristnar menniskjufatanir. Bíblian veitir okkum ikki eintýdda samanhangandi framseting um menniskjuna. Men kortini eru í Bíbliuni einstakir tekstir, sum til samans mynda okkum menniskjuna bæði við hædd, dýpd og vídd.

[3] 1. Mós 1,26-27. Byggir mannfrøði tín á Bíbliunnar grund, kanst tú ikki siga nakað um menniskjuna uttan fyrst at siga okkurt um Guð. Guð hevur opinberað seg í bíbilskum tekstum og í Jesusi Kristi. Alt Bíblian sigur um Guð, sýnir, at hann hevur umsorgan fyri menniskjuni og viðurskiftum hennara ( John Steiner Jacobsen, síða 73-92).

[4] Vanliga náttúruvísindaliga menniskjufatanin eins væl og modernaðu menniskjufatanini, ið hevur íblástur frá nýátrúnarligu sannleiksrelativismuni sigur, at sannleikanum skulu vit leita eftir í okkum sjálvum. Kristindómurin boðar harafturímóti, at sannleikin kemur frá Guði og skal opinberast okkum uttanífrá. Smb. gamla herróp okkara: ,,Við Guðs og hansara orðs hjálp". Diakoni er tískil ikki bara orð í verki, men orð og verk. Tað, sum eyðkennir diakonvirksemið er júst tað, at í tí er meir enn bara sosial hjálp.
Og hetta meira er av hjarta at boða medmenniskjum evangeliið um Jesus Kristus við øllum tí, tað inniber av ídni og hjartalagi í sambandinum við medmenniskjað.

[5] Sum meginregla er eingin munur á Guði og menniskjum (monisma). Magnus Malm sigur: ,,Tá ið vit góðtaka, hvørji vit sjálv eru, fara vit at gruna, hvør Guð er. Menniskjan fer fyrst at vaksa andliga, tá hon gevst at spæla Guð. Ikki fyrr enn vit taka ímóti Guði, víðkar heimurin seg fyri okkum, og vit fara at vaksa sum menniskjur. (Magnus Malm:,,Fodspor i glastrappen" s.85)
Kirsten Marie Bovbjerg skrivar í bók síni um New Age, at í hesi rørslu verður strembað eftir, at menniskjan skal fremja og uppliva sonnu nattúru sína. Hildið verður, at vit liva í følskum medviti, sum stavar frá uppvøkstri okkara og teimum fatanum, sum eru lagdar niður í okkum. Lært verður, at vit frá náttúrunnar hond eru fullkomin.
Vegurin til frælsi er at verða loystur frá strongd, ótta og sálarløsti. Frælsið menna vit, tá ið vit eru okkara innaru rødd lýðin. Læra vit at lurta eftir og týða tekin likams okkara, nærkast vit sannleikanum. (Kirsten Marie Bovbjerg: ,,Følsomhedens etik" s.86)

[6] Hetta er avgerandi grundgeving ímóti gagnstevnuni og menniskjufatan hennara. ,,Tá Guð á sinni gav menniskjuni ein arbeiðssetning í paradísi,

var endamálið, at hon skuldi umsita og nýta skapanarverkið. At menniskjan er skapað av Guði, merkir, at virði hennara ikki stendur og fellur í tí, hvørjar góðar ella ringar eginleikar, hon hevur. Mannvirðið er grundgivið í tí støðu, Guð veitir menniskjuni, t.e., at hon er skapað og elskað av Guði. Menniskjan hevur íborið virði, og hetta virðið er leyst av tí, sum menniskjan avrikar. Í stuttum sagt, kann menniskjan ikki ,,avrika" seg fram til tokka Guðs. (Bjarne Lenau Henriksen:,,Livskvalitet" s. 50-64).

[7] Samanborin við aðrar skapningar, hevur menniskjan sjálvstilvitsku, t.e., hon kann taka støðu til, hvussu hon eigur at bera seg at. Menniskjan kann grundandi skoða seg sjálva í spegli. Tá menniskjan grundar yvir mannalívið, sítt egna lyndi og endamál, tá stillar hon seg uttan fyri seg sjálva og skoðar seg sum í spegli. (Regin Prenter:,,Kirkens Tro"s. 70).

[8] Skal eyðkenni vælferðarsamfelagsins ikki bara vera tímilig vælferð, men eisini menniskjalig og andlig virði, eiga rættindi hins veika at síggjast og virðast.

[9] Vandi er fyri, at vit í Bláa Krossi halda teimum, sum vit hjálpa við viðgerð og umsorgan, í einum ósømiligum og óvirðiligum offurleikluti, tí vit hava misskilt hjálparstarv okkara. Vit kunnu so at siga elva til, at misnýtarin verður bundin at hjálp okkara, og vit verða bundin at hjálparloysi hansara. Kanska skuldu vit oftari nýtt orðið ,,stuðla" heldur enn ,,hjálpa".

[10] Menniskjan er skapað at liva í persónligum samfelagi við Guð, einum samfelagi, sum er ímyndað gjøgnum viðurskiftini millum Guðs einborna son og faðirin. Menniskjan er eisini skapað at liva í einum persónligum trúar-, lýdnis- og kærleikssamfelagi við Guð. Hetta kemur týðiliga fram í NT (Nýggja Testamenti). At Guð hevur skapað menniskjuna í síni mynd, merkir, at hann ger hana skikkaða at hava persónligt samfelag við Guð í trúgv, lýdni og kærleika.

[11] Harrin Guð segði nú: »Ikki er gott, at maðurin er einsamallur; eg vil gera honum medhjálp, sum hóskar honum. (1. Mós 2,18)

[12] Menniskjuni varð litið til at dyrka og verja aldingarðin (1. Mós 2,15), at leggja jørðina undir seg og at valda yvir dýrunum (1. Mós 1,28)

[13] Sí viðmerking 18

[14] Sambært bíbilskari/jødiskari fatan er menniskjan livandi sál, sett saman av anda og likami. Tríbýtið millum anda, sál og likam er býtið, sum stavar frá grikskum hugsanarhátti. Men felags fyri báðar fatanirnar í NT er, at tað likamliga og tað andliga ikki verður fatað sum mótsetningar.

[15] Tá ið, tað at vera bundin  at rúsdrekka virkar oyðandi fyri øll lívsins viðurskifti, kann ein allýsing sum er í trá við kristna menniskjufatan vera, at talan er um “samansetta líðing”.

[16] Hetta er ein týðulig avmarkan í mun til nýátrúnaðarliga menniskjufatanina, ið lærir, at likamið er eitt andans fongsil. Andligar venjingar skulu hjálpa tær at sleppa leys/ur av likaminum. Kristin menniskjufatan er grundleggjandi ósamd í hesi fatan. Í henni er eingin mótsetningur millum tað skapta og tað andaliga, men ein hugsan um, at alt er ein heild. Sambært NT er likamið tempul heilaga andans.
Avmarkingin er eisini í mun til náttúruvísindaliga uppfatan, ið hevur lyndi til at gera menniskjuna til eina lívevnafrøðiliga veru. Endaliga skal avmarkingin eisini síggjast í mun til nútíðardyrkan av mannalikaminum, har andaligur friður og styrki verður funnin við harðari venjing og klænkimati. Gud er uttan fyri menniskjuna, og tað andaliga kemur omanífrá, men her verður likamið gjørt til gud, har eg komi í samband við mítt sanna eg.

[17] Eysturríkski psykiatarin og psykoterapeuturin, Viktor E. Frankl, gjørdist gitin við ástøði sínum um ,,logoterapi” (meiningarterapi). Hann helt, at djúpasti tørvur menniskjunnar var at uppliva meining og høpi í tilveruni.
Mangar menniskjur nú á døgum fjeppast uppi í nýátrúnaðarligum rørslum, sum læra, at menniskjan er partur av einum guddómligum kosmos. Teir alternativu viðgerðarhættirnir byggja á tað, at ein duld orka streymar gjøgnum mannalikamið, t.e., tær hava eina energetiska menniskjufatan. Upp ímóti hesum fatanum stendur kristna heildarfatanin. Johannes Sanggaard hjá Bláa Krossi í Danmørk sigur: ,,Menniskjan varð skapað at liva í fýra sambondum: til Guðs, til sjálvan seg, til medmenniskju sína og til skapanarverkið. Og skal menniskjan liva heilskapað lív, skulu hesi sambond vera heil. Endamál Jesu á jørð var at endurskapa heildina í falna skapanarverkinum. Ørindi hansara vóru at skapa frið, shalom, og at endurskapa eina heild, og tað var júst tað, ið hendi, tá ið hann doyði  á krossinum.
Diakoniin hevur so statt sín uppruna í krossi Jesu Krists.”

[18] John Steinar Jacobsen s 73-92.

[19] Menniskjan má evna at skilja. Hon má hava samvitsku. Samvitskan er menniskjunnar ,,samvitan”um sítt innasta eg, hvat ið hon átti at gjørt og – ikki minst – hvat ið hon ikki átti at gjørt (tann ringa samvitskan). Hevur menniskjan ikki vit og samvitsku, er hon ikki før fyri at trúgva, at vera lýðin og at elska (Regin Prenter, Kirkens tro s. 75f).
Tað er bara, tá menniskjan er í sambandi við Gud, at hon er fræls (Magnus Malm s. 38). Malm ger vart við, at Gud gav Ísraels fólki tey 10 boðini, beint eftir at tey vóru leys av trælahaldinum í Egyptalandi. Boðini eru givin fyri at verja

frælsi og forða fyri, at menniskjan verður trælur av nýggjum. Malm endurgevur í hesum sambandi Dostojevski: “Um Gud ikki var til, so var alt loyvt” og Stanley Jones: “Menniskja brýtur ikki Guds boð – tað er menniskja, ið verður brotið”.

[20] Guð setti skilnað millum seg og menniskjuna við at banna Ádami og Evu at eta fruktina av einum av trøunum í paradísi. Men fyrstu menniskjurnar vórðu freistaðar at bróta hetta forboð, tí ormurin við tølandi orðum segði, at ótu tey av trænum, fóru tey at verða sum Guð, og  tí fóru tey at duga at skyna á illum og góðum. Seinni gjørdist teimum greitt, at tey - við at kenna óndskapin og lygnina – vórðu deyðiliga eitrað.

[21] Menniskjan er før fyri at trúgva, at vera lýðin og at elska. Hesi evni kunnu verða misnýtt. Og kristna áskoðanin á søgu mannaættarinnar er, at menniskjan misnýtti sína guddómligu støðu, ein misnýtsla, sum setti skilnað millum menniskja og Guðs.

[22] ,,Er menniskjan veruliga góð, hví er hon tað so ikki?” Piet Hein.

[23] Høvuðsmunurin á kristindómi og humanismu er, at humansiman ikki hevur rúm fyri Guði, og menniskjan tí einsamøll hevur ræði. Sambært humanismuni er menniskjan ikki syndari.

[24] Bíblian lærir, at sjúka og deyði komu í heimin saman við syndafallinum. Tí er burtur úr vón og viti, tá WHO hevur sum endamál ikki bara at beina fyri allari sjúku, men at menniskjan skal gerast fullkomin bæði likamliga, sálarliga og sosialt. Hesin høpisleysi hugsanarháttur er kanska orsøkin til, at mangar menniskjur halda, at tað er teirra skyld, at sjúka og deyði rakar tær. Kristna fatanin um vælveru er, at hon ikki er sjálvfylgja, men gáva. Hetta merkir eisini, at sjúka og deyði ikki eru serstøk revsing frá Guði. Samstundis fatar kristna fatanin um, at vit eru kallað at berjast ímóti sjúkum og líðingum, eins og vit berjast ímóti syndini og tí illa í heiminum.

[25] Týski sálarsjúkulæknin og samfelagsfrøðingurin, Horst Eberhard Richter, sigur í bók síni ,,Gudskomplekset”,  at vantandi evni og vilji hjá vesturlendsku mentanini at góðtaka og bera líðing fer at føra til undirgangs av hesi mentan.

[26] ,,Gera vit líðing til sjúkdómsfrøði, beina vit samstundis fyri øllum samhuga og allari hjartagóðsku” (John Steinar Jacobsen s. 73-92)

[27] Eitt uppskot til eina  meira hóskandi lýsing kundi verið, at tað at vera bundin av rúsdrekka er fjøltáttað líðing.

[28] At vita, at vit eru syndarar, er at verða loyst frá tí skuld, sum altíð fylgir við frumsøgnini um, at vit ikki eru tað.

[29] ,,Lutherska læran hevur gjørt boðskapin um rættvísgerð við trúgv til sjálvan miðdepilin í læruni um menniskjuna: ”Menniskjan evnar ikki við egnari megi og gerðum at rættvísgera seg fyri Guði, men hon verður rættvísgjørd við trúgv á Kristus. (CA art. IV) (John Steinar Jacobsen s.73-92)

# Bókmentalisti:


| | |
|---|---|
| Elstad, Gunnar | Hjælp til hjælp. Dansk Luthersk forlag, 1991 |
| Foss, Øyvind | Kirkens diakoni. Aarhus universitetsforlag, 1992 |
| Frankl, Viktor | Det overhørte råb om mening, psykoterapi og humanisme. Gyldendal 1993 |
| Frankl, Viktor | Psykologi og eksistens, Gyldendal 1993 |
| Frankl, Viktor | Psykologiens menneskebillede, Munksgård, 1970 |
| Hagedorn, Tom | Lex natura. Når virksomheden træder i karakter. Trinity Consult 2001 |
| Hauge, Kjetil | Liv og helse. Et teologisk syn på helbredelse. Bidrag til forståelse og samtale. Verbum, 1985 |
| Jacobsen, John Steinar | Hva er et menneske?. NLA-forlaget 1966 |
| Jensen, Edvard | Menneskesyn. Lohse 1955 |
| Lewis, C.S. | Menneskets Afskaffelse. Mimer, 2001 |
| Malm, Magnus | Fodspor i glastrappen. Boedal, 2001 |
| Nielsen, Helge Kjær | Han elskede os først. Aarhus Universitetsforlag, 1994 |
| Nissen, Karsten (red.) | Diakoni – en integreret dimension i folkekirkens liv. Aros 2001 |
| Nissen Karsen og Villumsen, Carl Erik | Diakoni – en forsømt dimension i kirken? Aros, 1983 |
| Nordlander, Agne | Bibelens syn på mennesket. Kristent pædagogisk forlag, 1994 |
| Oftestad, Alf B. | Hvor går kirkens diakoni, Luther Forlag, 1977 |
| Oftestad, Alf B. (red.) | En bok om kirkens historie, Frimodt, 1969 |
| Roness, Atle | Dig og dit liv, Unitas 2000 |
| Sanggaard, Johannes (red.) | Alkoholspørgsmålet og den kristne frihed. Blå Kors Forlag, 1995 |
| Sveinall, Arne Tord | Det virker jo.... Credo 1995 |
| Thelle, Notto R. | Dit ansigt søger jeg. Det økumeniske fællesråd, 1998 |
| Tøttrup, Gunnar | Med hjerte, mund og hænder. Lohse 1988 |
| Valen-Sendstad, Aksel | Innføring i kristen etikk. Luther Forlag, 1984 |

**Blái Krossur Føroya**
**Heiðavegur 32**
**600 Saltangará**
**Tlf. 470 700**
**Fax: 470 701**
**T-postur: blakross@blakross.fo**
**Heimasíða: www.blakross.fo**